UTTAN ÚR HEIMI

## Vilja hava fólkaatkvøðu

Sosialdemokratiskir ES-andstøðingar í Svøriki krevja nú, at sviar skulu sleppa at taka støðu til ta ætlaðu ES-grundlógina á einari fólkaatkvøðu.

Sostatt fær Gøran Persson, forætisráðharri, mótstøðu frá sínum egnu. Stjórnin ætlar, at Ríkisdagurin skal gera av, um Svøríki skal taka undir við grundlógini, og har er stórur meiriluti fyri lógini, tí teir borgarligu taka eisini undir við henni. Men teir sosialdemokratisku ES-andstøðingarnir halda avgerðina vera so týðandi fyri Svøríki, at fólkið eigur at sleppa at at taka avgerðina.

Týsdagin samtykti Samveldisdagurin í Týsklandi grundlógina við stórum meiriluta, og í vikuni hava eisini Slovakia og Eysturríki tikið somu støðu. Frammanundan hava Grikkaland, Italia, Letland, Spania og Slovenia góðkent grundlógina. Tann 29. mai skulu fransmen á fólkaatkvøðu um málið, og har er stórur spenningur um úrslitið. Skal grundlógin fáa gildi, mugu øll tey 25 ES-londini góðkenna hana.

## Málið skjótt klárt

Um nakrar fáar dagar fer ein amerikanskur hernaðardómstólur at viðgera eina ákæru ímóti einum hermanni, sum er ákærdur fyri ósømiliga framferð ímóti fangum í Abu-hraib fongslinum í Irak.

Tann 27 ára gamla Sabrina Harman hevur boðað frá, at hann fer at nokta seg seka,, tá málið kemur fyri, tí hon heldur ikki, at hon gjørdi nakað skeivt. Men hesum er ákæruvaldið als ikki samt við henni í. Tvørturímóti er hon ákærd fyri at hava skrivað orðið "neyðtøkumaður" upp á beinið á einum irakskum fanga, og hon er eisini ákærd fyri at hava noytt ein fanga at standa uppi á einum kassa. Tá maðurin var komin at standa á kassanum, bant Sabrina Harman leirningar í bein hansara, og maðurin fekk at vita, at hann doyði av elektriskum stoyti, um hann datt av kassanum.

Ákæruvaldið fer at leggja 29 myndir fram í rættinum. Á einari mynd stendur Sabrina Herman uppi yvir líkinum av einum fanga. Maðurin var eftir øllum at døma deyður eftir at hava fingið ringa viðferð frá CIA-monnum, sum høvdu avhoyrt hann, skrivar AP.

## Skulu kanna jarðskjálvta

BBC og Discovery Channel ætla sær at kanna økið, jar tann harði jarðskjálvtin annan jóladag í Suðurasia hevði miðdepil. Tað var hesin skjálvtin, sum elvdi til ta oyðandi flóðalduna.

Tær báðar sjónvarpsstøðirnar ætla at gera ein tveir tímar langan film um jarðskjálvtan og flóðalduna. Við nútímans útgerð skulu kavarar og granskarar taka myndir av havbotninum, og ætlanin er síðani at greiða frá tí, sum hendi. Sjálvur jarðskjálvtin verður eftirgjørdur, og tað verður flóðaldan eisini.

Julian Ware, sum stendur fyri verkætlanini, sigur, at filmurin er ein vísindalig roynd at lýsa tað, sum hendi annan jóladag. Harafturat roknar hann við, at kanningarnar kunnu geva jarðfrøðingum og øðrum vísindafólki áhugaverdar upplýsingar um, hvat hendir, tá ein jarðskjálvti elvir til eina so stóra flóðaldu, hvussu tað hendir, og ikki minst hvussu skjótt tað hendir. 21 vísindafólk eru við í verkætlanini hjá BBC og Discovery Channel.

## Hava ongan skúlalækna

Innanríkis- og heilsumálaráðið í Danmark er skelkað av einari kanning, sum vísir, at 89 danskar kommunur hava ongan skúlalækna.

Tað merkir, at skúlabørnini í teimum 89 kommununum verða ikki kannað tvær ferðir í skúlatíðini, soleiðis sum lógin annars fyriskrivar, skrivar Politiken. Summar kommunur hava roynt at loysa trupulleikan við at lata sjúkrasystrar kanna børnini, men tað er sambært blaðnum ólógligt. Birgitte Barfod, sum er skúlalækni á Suðursælandi, sigur, at tað er væl hugsandi, at skúlabørn í teimum 89 kommununum hava sjúkur, sum eingin hevur varnast enn, tí børnini eru ikki kannað hjá lækna.

Í innanríkis- og heilsumálaráðnum siga tey, at kommunurnar hava fingið boð um at fáa viðurskiftini í rættlag, men tølini vísa, at tað gongur tann skeiva vegin. Í 1998 høvdu 59 kommunur ongan skúlalækna, og nú er talið sum nevnt 89.



*Amerikanararnir hava ikki bara mótstøðuna í Irak at stríðast við. Her eru tað mótmælisfólk í Kabul, sum krevja, at USA skal taka hermenninar úr Afghanistan*

# Krevja USA úr Afghanistan

**Stórar mótmælisgongur í teimum størstu afghansku býunum vilja hava amerikanararnar av landinum**

AFGHANISTAN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað byrjaði fyri nøkrum døgum síðani, tá fleiri hundrað studentar gingu mótmælisgongu í býnum Jalalabad. Studentarnir tveittu grót eftir útlendskum skrivstovum og kravdu, at allir útlendingar skuldu fara av landinum beinanvegin. Løgreglan legði uppí, og minst fýra fólk doyðu í samanbrestunum.

Dagin eftir breiddu mótmælini seg til høvuðsstaðin Kabul og til aðrar býir. Mótmælisfólkini settu eld á amerikanska flaggið og kravdu, at USA skal taka sínar hermenn úr landinum alt fyri eitt.

Reuters skrivar úr Kabul, at nógvir afghanar eru ímóti, at USA hevur hermenn í landinum, og mótstøðan ímóti amerikanarunum herðist í hvørjum. Amerikanararnir verða lagdir undir at fara alt ov harðliga fram. Í seinastuni hava fleiri samanbrestir verið ímillum amerikanskar hermen og vápnaðar uppreistrarmenn, sum verða hildnir at hava samband við tað frákoyrda Taliban-stýrið.

Ófriðurin teir seinastu dagarnar kyknaði, eftir at blaðið amerikanska tíðarritið Newsweek hevði prentað eina grein um viðurskiftini í fangaleguni í Guantanamo í Kuba. Blaðið vildi vera við, at undir avhoyringum hava teir amerikonsku fangavørðarnir vanhalgað Koranina fyri at "bloyta" fangarnar. Sambært AP hava konservativir prestar í Afghanistan gjørt sær dælt av tíðindunum í Newsweek og øst fólk til at seta seg upp ímóti teimum amerikonsku hermonnunum.

Amerikanska uttanríkisráðið hevur ikki gjørt stórvegis viðmerkingar til hendingarnar í Afghanistan, men viðgongur kortini, at ófrðurin er tann ringasti síðani innrásina í 2001.

# Samanbar pávan við Hitler

**Franska sjónvarpsstøðin Canal Plus hevur fingið eina átalu fyri at kalla Benadikt 16. páva "Adolf 2."**

ÓHEPPIÐ SKEMT

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Franska fjølmiðlaeftirlitið heldur, at Canal Plus fór langt út um markið, tá støðin í einari sokallaðari skemtisending umrøddi Benadikt páva sum "Adolf 2.". Harafturat vildi sendingin vera við, at tann nýggi pávin vælsignar katolikkarnar "í navni Faðirsins, Sonarins og Triðja ríkisins navni."

Í sendingini varð eisini víst á, at á ungum árum var Joseph Ratzinger limur í Hitlerjugend.

Fleiri katólskir biskuppar jødiskir felagsskapir í Fraklandi hava mótmælt sendingini, og teir fáa eftir øllum at døma fulla undirtøku frá franska fjølmiðlaeftirlitinum. Eftir lógini skulu fjølmiðlarnir viðgera politisk, mentanarlig og átrúnaðarlig evni við virðing, og tað heldur eftirlitið ikki, at Canal Plus gjørdi í hesum føri. Tí kann støðin vænta at fáa eina stóra bót, skrivar AFP.